## Beinta um Odense

Odense er ein býur, sum stendur í stað. Eg havi ikki tað stóra góða at bera býnum. Eg eri eitt sindur troytt av at verða í einum býi sum næstan bert profilerar seg við H.C. Andersen. Í Odense eru tvey super góð Leikhús, Odense Teater og Teater Momentum, har vit spæla, men fólk vita bert um Odense Teater, sjálvt um Momentum liggur mitt í býnum, tí er tað ergriligt, tá eg hoyri fólk frá býnum siga at onki hendir her. Eg kann ikki siga meg heilt frían fyri at verða blivin áðvirka av at eg gangi í flokki saman við sjey persónum sum øll hava búð í Keypmannahavn, áðrenn tey komu inn á skúlan.



## Beinta um danska filmslist

Eg haldi, at tað er keðiligt altíð at síggja tey somu andlitini í donskum filmum, Tey brúka ikki nýggj andlit, men eg haldi, at vend er komin í. Filmídnaðurin sær, at fólk eru opin fyri smalu filmunum, tað sum er eksperimentarandi er áhugavert. Nógvir filmar verða gjørdir og góðskan blívur bara betur og betur.



*- Tað sum fasinerar meg mest við sjónleiki, er sjónleikur er at vísa ein spegil upp á samfelagið og hvussu menniskju eru. Hetta síggi eg sum tí mest fornemmu uppgávuna, sum sjónleikur hevur, og hetta hevur verið mín drívmegi fyri at fáast við sjónleik, sigur Beinta Clothier, sjónleikari*

høvdu fingið depressiónir og vóru endaðir í misbrúki. Tí vildi hon tryggja sær, at vit kendu munin á leikinum og okkum sjálvum. Man skal ikki hava privatar kenslur við á pallin, tí tað er ikki sjónleikur haldi eg í hvørfall.

– Vit arbeiddu nógv við ikki voldiligari kommunikatión og ein terapeutur var tilknýttur skúlan. Vit lærdu at kommunikera sakliga, uttan at koma við ákærum, greiðir Beinta frá.

Á skúlanum hava tey eisini arbeitt nógv við maskum. Hetta hevur Beinta lært sera nógv av.

– Eg havi funnið útav, hvussu nógv eg ikki visti. Eg lærdi at seta orð á, hvat tey ymisku tingini, sum eg gjørdi, itu og sum eg hevði og dugdi, áðrenn eg kom inn á skúlan.

### Føroyar mugu bíða

Seinastu vikuna hava Beinta og hini á hennara ári havt sína endasýning, ið er sjálvur endin á útbúgvini. Leikurin; Kærlighed og menneskerester av kanadiumanninum Brad Fraser er ein leikur úr 80'unum, um menniskju, ið øll eru einsom, tey leita øll eftir ymsikum.

Leikurin er eitt esemble stykki har allir leikararnir fáa nógv pláss. Men leikluturin hjá Beintu sum Candy er ein sentralur leiklutur. Hon er ein kvinna, ið leitar eftir fullkomna manninum. Leikurin verður sýndur á Teater Momentum og verður sýndur seinastu ferðina leygarkvøldið, og tá teppið fer fyri, er Beinta liðug við sjónleikaraútbúgvingina. Men tað er ikki víst, at Beinta verður at síggja á føroyskum palli fyribils.

– Eg vil gjarna heim at arbeiða, men eg flyti ikki heim enn. Sum sjónleikari eru størri avbjóðingar her enn í Føroyum. Eg havi brúkt hesi fýra árini til at fáa danska málið heilt upp á pláss. Eg kenni nógv fólk her og nú vil eg gjarna prøva ting av. Men fyrst ætli eg, at halda eina langa summarfrítíð.

Fyrsta verkætlanin, ið Beinta hevur á skránni, er ein verkætlan, ið hon skal undir í november saman við einum, ið verður liðugur á sjónleikaraskúlanum í Århus í summar.